

## Olivur við Neyst í Leikalund

Listamaðurin Olivur Við Neyst fer allan november mánað at sýna fram sína list í Leikalund í Klaksvík. Sjálvur kemur Olivur úr Klaksvík, har hann var føddur í 1953. Hann gekk á listaháskúlanum í Keypmannahavn í árunum 1975 - 1979. Olivur hevur haft eitt ótal av framsýningum bæði í Føroyum og uttanlands, og er sera væl umtóktur sum listamaður.

Á framsýningini í Leikalund, sýnir Olivur framm vatnlit og pastellmyndir. Hetta eru skitsur hann hevur arbeitt við úti í náttúruni. Myndaevnini eru norðanfjørðs og úr Finlandi, har hann var í 2001. Ferninseringin verður 3. november, og er framsýningin opin allan mánaðin.

## Alkohol drepur flest

Høgtøl úr Finnlandi sýna, at alkohol var beinleiðis ella óbeinleiðis orsøk til 17,7% av deyðstilburðunum millum finskar menn í 2005. Tað ger alkohol til vanligastu deyðsorsøkina hjá monnunum. Hjá kvinnum var talið fyri alkohol 10,6%, og er hetta næst vanligasta deyðsorsøkin. 10,7% av deyðsføllunum millum finsk konufólk vóru av bróstkrabba.

# Árnafjørður: Ein góðan tunnil og

**– Verður ikki gjørt okkurt við tunlarnar hjá okkum, so verða vit bumbað langt aftur í tíðina.**
**– Tunlarnir eru snøgt lívshættisligir, sigur árnfirðingurin Atli S. Justinussen, sum eisini er býráðslimur í Klaksvík**



*- Verður ikki okkurt gjørt við samferðsluna hjá okkum í Árnafirði fer tað at merkja trivnaðin og menningina av bygdini, sigur Atli Justinussen. Í løtuni eru trý grundøki tøk í bygdini, men neyðugt er at útvega enn fleiri*

FERÐASAMBAND
*Orð og myndir:*
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Árnafjørður:** – Tað er avgjørt neyðugt at umstøðurnar verða betraðar hjá okkum sum ikki hava annan møguleika enn at koyra gjøgnum ein tunnil, um vit skulu av bygdini, sigur Atli.

Sjálvur hevur hann við góðum stuðli frá Klaksvíkar kommunu gjørt sítt til at ferðasambandið til bygdina skal verða dagført.

- Verður ikki okkurt gjørt nú, so steðgar øll menning og allur trivnaður upp her í Árnafirði. Tað kann eg ikki standa tigandi yvirfyri, slær hann fast.

Hetta býráðið sum nú situr hevur veruliga víst, at tað er opið fyri at menna bygdirnar í kommununi, og ynskir at nakað skal henda.

Tann stóri spurningurin er kortini um nakað verður gjørt við Árnafjarðartunnilin, nú tvær aðrar tunnilsætlanir eru í umbúna í økinum norðanfyri.

- Men okkara tunnil er í øllum førum ótíðarhóskandi. Her má okkurt gerast, sigur Atli Justinussen.

### Óúthaldiligt

Hetta málið við tunnilssambandinum hjá árnfirðingum er ikki eitt nýtt mál á dagsskránni hjá Atla.

Bæði áðrenn hann varð valdur inn í Klaksvíkar býráð - og ikki minst nú hann er partur av samgonguni - hevur hetta málið ligið frammarlaga at finna eina loysn á.

Ikki bert eina skjóta loysn, men eina loysn sum árnfirðingar kunnu liva við í mong ár fram, og sum veruliga kann verða við til at menna bygdina aftur.

Ein part av hesi ætlan síni hevur hann nú fingið ígjøgnum, tá kommunan í september mánaði gjørdi ikki mætari enn at skriva til myndugleikarnar um at arbeiða fyri at tunnilin millum Árnafjørð og Klaksvík varð dagførdur.

- Soleiðis sum støðan er í dag er hon óúthaldilig fyri allar borgarar Norðan fyri Fjall. Her tosi eg ikki bert um bygdarfólkið hjá mær, men eisini um tey norðuri í Sundi og á Viðareiði.

- Tunlarnir eru snøgt sagt lívshættisligir, serliga nú tá so nógv tung ferðsla er, slær Atli fast.

Serliga um summarið ger hetta seg galdandi, tá nógv ferðsla er av teim vitjandi. Saman við stóru lastbilunum er ikki óvanligt at proppur kemur í tunnilin og so steðgar alt upp.

- Ja, eg havi sjálvur sæð mangar bilar sum hava rent á skeltini inni í tunlinum, ella sum eru farnir niður í veitina. Orsøkin til hetta er stutt sagt, at tunlarnir eru óforsvarligir, sigur Atli.

> *Eg havi sjálvur sæð mangar bilar sum hava rent á skeltini inni í tunlinum, ella sum eru farnir niður í veitina. Orsøkin til hetta er stutt sagt, at tunlarnir eru óforsvarligir*

### Má ikki gloymast

Sum árnfirðingur dugir Atli væl at skilja teir trupulleikarnar sum ótíðarhóskandi tunlarnir geva fólki. Hann ynskir tí eina haldbara loysn, og hevur tí í fyrsta lagi arbeitt við málinum í býráðnum.

Men hann hevur sjálvur eisini verið hjá landsins myndugleikum við hesum trupulleikanum.

- Eg havi sjálvur verið bæði hjá landsverki og vinnumálaráðnum fyri at greiða teimum frá støðuni.

- Tað ringasta er kortini tað, at Árnafjørður higartil ikki hevur verið uppi á listanum yvir nýggjar tunlar sum skulu gerast her í økinum, slær hann fast.

Arbeitt verður í løtuni við tveimum ætlanum: Einari ætlan um tunnil Norður um Fjall, sum skal loysa báðar teir gomlu tunlarnar av. Og einari ætlan um tunnil millum Hvannasund og Viðareiði. Men einki verður sagt um tunnilin til Árnafjarðar!

Sjálvur er Atli sera fegin um loysnina at gera hesar báðar tunlarnar í framhaldi av hvørjum øðrum. Ein eigur kortini ikki at steðga her, tí sambært Atla Justinussen er vandi fyri at Árnafjørður verður gloymdur í hesum sambandi.

### Blindtarmur

Tá ein hevur valt at fremja hesar loysnirnar og tá koyrandi verður Norður um Fjall, eigur ein tí at gera skjótt av:

Steingja Árnafjarðartunnilin, breiðka og hækka hann til eina hóskandi støðd og so beinanvegin fara í holt við tunnilin til Viðareiðis.

- Vit mugu gera vart við okkum nú, so at vit koma við í raðfestingina. Annars verða vit bara gloymd, og koma so kanska at liggja sum ein blindtarmur við ongari framtíð.

- Og so mugu vit heldur ikki gloyma trygdina. Tí tá hava vit ein eyka møguleika at sleppa fram og aftur um so